## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi og seinnapartin regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av suðri og sirm ella mjørki, men um kvøldið klárari veður. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og regn eitt skifti. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Elisabeth Pike í SMS

**Fyrrverandi fotomodellin sýnir verk hjá sær fram á Torginum í SMS**

Í døgunum 30. juli til 4. august hevur føroyska listakvinnan, Elisabeth Pike, framsýning á Torginum í SMS.

Sum ung arbeiddi Elisabeth sum fotomodel í Danmark og Føroyum. Seinastu mongu árini hevur hon búð í Kanada, og tað var eisini har, hon fekk áhugan fyri list.





Í fjør fekk hon útbúgving í list á Onatario College of Art and Design. Somikið væl gekk hjá henni, at hon fekk heiðursløn fyri sítt avrik, og listaverk hennara vórðu sýnd fram á skúlanum hon gekk.

Elisabeth hevði sína fyrstu listaframsýnini í 1978, tá ið hon sýndi fram í Listaskálanum. Síðani hevur hon havt nógvar framsýningar kring um í heiminum, m.a. í Detroit, Toronto, Brússel og Keypmannahavn. Hon hevur eisini við jøvnum millumbilum sýnt fram á Torginum í SMS.

Framsýningin hjá Elisabeth er opin hvønn dag frá kl. 10.00 og til handlarnir lata aftur.

Saman við Elisabeth á Torginum hesa vikuna er eisini stóra Ólavsøkuframsýningin, sum í ár er av sluppmodellum og myndum av manningum.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 14 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 26 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 26 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 30 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 33 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 22 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 34 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 987 hPa. við Lofoten fer í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 1008 hPa. við Hvarvið fer eystureftir.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikudag seinnapart.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/07 kl. 06⁰⁰– 31/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,9°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 30/07 kl. 06⁰⁰– 31/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 76,3 mm

## Summarútsølan byrjar mikudagin

Mikudagin kl. 12 lata handlarnir í SMS dyrnar upp og bjóða í rúgvuvís av vørum fyri nógv niðursettar prísir.

Hetta er tann árliga summarútsølan, og sum vanligt hava fleiri av handlunum eisini kø- og tímatilboð, har ávísar vørur verða seldar fyri serliga nógv niðursettar prísir.

Í samband við útsøluna gevur SMS eitt stórt útsølublað út. Blaðið er partur av VikuBlaðnum, sum varð borið út mána- og týsdagin 30. og 31 juli, og har verður lýst við øllum teimum mongu tilboðunum, sum handlarnir í SMS hava mikudagin og annars meðan útsølan er.

HESTPRENT Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august: Fullmáni
5. august: Mánin longst frá jørðini
12. august: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. aug. | 05.25 | 17.49 | 04.25 | 16.49 | 04.40 | 17.04 | 07.25 | 19.49 | 08.25 | 20.49 | 03.40 | 16.04 | 02.40 | 15.04 | 05.40 | 18.04 | 06.40 | 19.04 | 05.10 | 17.34 | 06.25 | 18.49 |
| 2. aug. | 06.14 | 18.38 | 05.14 | 17.38 | 05.29 | 17.53 | 08.14 | 20.38 | 09.14 | 21.38 | 04.29 | 16.53 | 03.29 | 15.53 | 06.29 | 18.53 | 07.29 | 19.53 | 05.59 | 18.23 | 07.14 | 19.38 |
| 3. aug. | 07.02 | 19.25 | 06.02 | 18.25 | 06.17 | 18.40 | 09.02 | 21.25 | 10.02 | 22.25 | 05.17 | 17.40 | 04.17 | 16.40 | 07.17 | 19.40 | 08.17 | 20.40 | 06.47 | 19.10 | 08.02 | 20.25 |
| 4. aug. | 07.48 | 20.11 | 06.48 | 19.11 | 07.03 | 19.26 | 09.48 | 22.11 | 10.48 | 23.11 | 06.03 | 18.26 | 05.03 | 17.26 | 08.03 | 20.26 | 09.03 | 21.26 | 07.33 | 19.56 | 08.48 | 21.11 |